# Fólk missir álitið á Bygdaleiðum

**Tænastan hjá Bygdaleiðum er so vánalig, at fólk aftra seg við at brúka bussarnar, halda ferðafólk, sum tvær ferðir í tveir dagar vóru úti fyri, at tey ikki sluppu við bussinum hjá Bygdaleiðum**

*Bussarnir, sum koyra flogrutuna, kunnu koyra óregluliga, alt eftir, hvussu flogferðslan er. Men tað vita fremmand ferðafólk, sum bara hava eina førosyka ferðaætlan, ikki*

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*



**Vágar:** Tað ber ikki til at gera eina ferðaætlan, sum bara er skrivað á føroyskum, um ein ætlar, at útlendsk ferðafólk eiisni skulu brúka ruturnar, feðraætlanin umfatar.

Tað halda nøkur dosnk ferðafólk, sum her fyri vóru í Føroyum í fýra dagar. Tey búðu í Vágum og høvdu keypt sær tað sonevnda »Travel Card« til bussarnar hjá Bygdaleiðum. Men tey høvdu ikki lagt uppfyri, at tey ikki skiltu tað, sum í feðraætlanini stóð.

Men tað sum verri var, siga tey, var, at tað, tey skiltu, passaði heldur ikki, tá samanum kom. Tey dugdu at lesa tíðirnar, tá bussurin skuldi koyra frá steðgiplássinum beint við, har tey búðu. Men hóast tey vóru til tíðina við steðgiplássið, kom eingin bussur. Tað vísti seg nevniliga, at hann farin einar átta minuttir fyri tíðina, sum stóð í ferðaætlanini.

Tíbetur fyri hesi fólkini var tann bussurin farin vestureftir, so hann var í oynni, og til bar so hjá staðkendum fólki, sum kom fremmandafólkunum til hjálpar, at fáa bussin at koma aftur eftir teimum. Tey komu so fram tann dagin.

Dagin eftir var verri vorðið. Tá skuldi ferðalagið fara útferð í Norðoyggjar og Eysturoynna og høvdi so lagt sær dagin soleiðis til rættis, at tey fóru við flogbussinum úr Vágum fyrrapartin.

Men aftur her var prentingin av ferðaætlanini orsøk til, at tey komu tvørt fyri.

Tey sóu væl, at tað stóð ein tekning av einum flogfari framman fyri tíðini, bussurin skuldi koyra. Men tey dugdu ikki at lesa á føroyskum, at flutningsfelagið gjørdi vart við, at tað kundi henda, at bussurin ikki helt tíðina, um flogfarið ikki kom punktliga til sína ásettu tíð.

Sostatt stóðu fólk við eitt steðgipláss frá klokkan 11 fyrrapartin og bíðaðu eftir einum bussi, sum kom trý korter seinni. Og tá fingu tey bara at vita, at hesin bussurin var fullur, og tók ikki eitt ferðalag við, sum ikki hevði boðað frá frammaundan. Tað kom heldur eingin eykabussur, so tey máttu bíða eftir næsta bussinum, sum kom klokkan hálvgum trý seinnapartin. Úrslitið varð so, at fólkini komu ongantíð har, tey høvdu ætlað sær.

Eitt annað er so, at flogrutan kann í dag ikki brúkast, um ein ætlar sær úr Vágum í Eysturoynna. Tað skal skiftast so ofta á vegnum, at tað hava fremmandafolk ikki møguleika fyri at klára uttan holla vegleiðing, vísa fólk í ferðavinnuni á. Til tess passa ruturnar hjá Bygdaleiðum ov illa saman.

Strandferðslan og harvið føroysk ferðavinna fer í seinna enda at missa upp á hesi viðurskifti, vísa donsku feðrafólkini á.

Tey høvdu keypt sína ferð gjøgnum eina ferðaskrivstovu, sum hevði víst teimum á, at tey kundu keypa hetta góða »Travel Card« og so brúka bussarnar, sum tey høvdu hug til eitt ávíst dagatal.

Hugskotið var fínt og passaði væl til teirra ætlanir, søgdu tey. Men tað gjørdi restin av ferðaætlanini so ikki. Og úrslitið verður, at ferðaskrivstovan fer at aftra seg við at upplýsa slíkt fyri fólki aftur, siga tey.

Poul Jákup Thomsen, fólkaflutnignsleiðari á Strandfaraskipum Landsins, ásannar, at trupulleikar hava verið við tænastuni hjá Bygdaleiðum á onkrum økjum. Hann vísir til sparingarnar, stovnurin hevur fingið álagdar. Onkunstaðni mugu tær sígjast aftur, og tað verður so í hesum førum tænastan, sum versnar, sigur hann.

Hann harmast um hesi ávísu dømini og sigur, at arbeitt verður við at fáa ferðaætlanirnar prentaðar á fleiri málum. Eitt nú norðurlenskum og enskum, so í minsta lagi slíkar misskiljingar kunnu umgangast. Men enn er tað so ikki komið so langt, ásannar hann.

– Nakað hava vit bøtt um, men ikki nokk. Vit vóna, at tað fer at bera til, men tað eru fleiri ting, sum spæla inn, sigur hann.

# Sibbaveitsla í Miðvági



**Ættarstevna verður í Miðvági eina viku eftir Vestanstevnu. Tað eru tey, sum ættað eru úr Sibbanum við Kirkjar í Miðvági, sum fara at hittast**

ÆTTARSTEVNA

Ættfólk teirra Siggu Katrinu og Hans Frederiks Hansen í Sibbanum við Kirkjar í Miðvági fara at hittast á stevnu tann 19. juli.

Stevnan er fyri øll, sum ættað eru frá Siggu Katrinu, fødd í Miðvági í 1864, og Hans Frederiki, føddur í Miðvági 1863. Sigga Katrina doyði í 1920, og Hans Frederik í 1931.

Tey bæði áttu fimm børn, sum vuksu til og giftust og búsettust ymsastaðni. Tvey í Miðvági, tvey í Kollafirði, og ein í Kanada.

Tað eru eftirkomarar teirra, sum nú vilja hitast aftur á gamlari grund og seta hvørjum ørðum stevnu í bygdarhúsinum í Miðvági tann 19. juli klokkan 19.00

Tey, ið hug hava at luttaka á stevnuni, kunnu venda sær til fyrireikararnar, sum eru: Johild Johannesen í Klaksvík, sum hevur tlf. 456411, Hervør Petersen í Norðdepli, tlf 452066, Anna Elisa Jacobsen í Miðvági, tlf. 332687 ella Torbjørn Sæbúð í Hósvík, tlf 422567

**ej**

# Blokada á flogvøllinum

**Arbeiðarafeløgini herða nú verkfallið. Havnirnar eru stongdar, og eingin farmur verður lossaður úr farmaskipunum, sum liggja við bryggju. Fólk og fyritøkur hava tó funnið útav, at til ber at flyta farm við flogfari og fáa flutningsfyritøkur, sum ikki eru í verkfalli, at flyta heim. Men tí hava arbeiðarfeløgini nú steðgað**

BLOKADA
*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Verkfallið á privata arbeiðsmarknaðinum merkist nú eisini við portrini á flogvøllinum. Blokaduvaktir syrgja fyri at eingin farmur sleppur úr flogførunum út um gyrðingarnar við vøllin.

Síðan verkfallið varð lýst, hava vaktir syrgt fryi, at einki hevur verið lossað úr skipum, sum liggja við bryggju, ella tikið út av vørugoymslum ymsastaðni í landinum.

Men tað hava summi funnið út av at umganga við at flyta farm til landið við flogfari.

Tað hevur gingið fyri seg á tann hátt, at privatar flutningsfyritøkur, sum hava bilar til endamálið, koyra farmin av flogvøllinum til móttakaran. Soleiðis hevur í ávísan mun borið til at fingið tað, ein hevur havt brúk fyri. Serliga eykalutir og smærri kolli.

Men hetta verður nú steðgað, sigur Føroya Arbeiðarafelag, og týsmorgunin setti felagið vaktir við portrini á flogvøllinum. Boðini vóru greið, tað skuldi eingin farmur úr flogfarinum út um portrini.

Týsmorgunin var bara eitt flogfar, sum kom í Vágar. Tað var flogfarið hjá Maersk, og har var eingin farmur við, varð sagt av flogvøllinum. Postur kom tó, og hann varð avgreiddur sum vanligt.

Lossingarmenninir á flogvøllinum eru í verkfalli, so har eru stjórar komnir at bera kuffert um dagarnar.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.




### Fimm ættarlið

5. februar í ár fingu Poula Frida Ennistíg, Hoyvík, og Andras úr Pállstovu Petersen, Norðdepil, ein son, hann eitur Tróndur úr Pállstovu Ennistíg. Her sita frá vinstru: omman, Jórun Ennistíg, Hoyvík, langomman, Magnhild Jacobsen, Havn, olduromman, Frida Debes, Gjógv, við Tróndi, og mamman, Poula Ennistíg, Hoyvík.

### Hemming Petersen 35 ár hjá SEV



1. mai hevði Hemming Petersen í Klaksvík arbeitt 35 ár hjá Sev sum linjumaður í Norðoyggjum. Hemming er føddur 2. juli í 1938 í Klaksvík, sonur Rakul, f. Joensen, av Húsum og Berint Petersen, vanliga nevndur Berint úr Svínoy. Áðrenn Hemming kom til SEV í 1968, arbeiddi hann í kolonialhandlinum hjá J.F. Kjølbro á Stongunum. Ein stórur partur av teirra virksemi var at proviantera skip, hetta var áðrenn fyritøkan fekk sína egnu heilsølu. Hemming er giftur við Sáru, f. Klein, úr Hattarvík, og tey eiga tríggjar synir og eina dóttur.

# Familjulega fyri brekað á Zarepta



*Savnsmynd*

**Í døgunum 15.-18. mai verður familjulega fyri brekað á Zarepta í Vatnsoyrum. Legan er ætlað øllum, ið bera brek og familjum teirra. Frá 30. mai til 1. juni, verður ein lega fyri einlig**

LEGUR
*Magnus Gunnarsson*

Eins og undanfarin ár verður familjulega fyri brekað á Zarepta í Vatnsoyrum í døgunum frá 15.-18. mai. Legan er ætlað øllum, ið bera brek og familjum teirra. Á leguni, sum verður myndað eftir, hvat luttakararnir ynskja, verður millum annað: fyrilestrar, pallborð, samltalubólkar, tónleikur, leikvenjing og fimleikur, eisini verða andaktir og nógvur sangur. Legan verður sett hóskvøldið kl. 21.00. Familjulegan fyri brekað varð fyrstu ferð hildin í 1981, og hevur hon verið hildin hvørt ár síðan tá. ST hevði tá á fyrsta sinnið lýst árið 1981 av vera ár teirra brekaðu. Árið 2003 er nú av ES lýst sum ár teirra brekaðu, og hevur landsstýrið tikið undir við hesum við heitinum "Føroyar fyri øll". Ein av fyrireikarunum, Róland í Skorini, sigur: "Legurnar hava mangan verið hildnar í verkfallstíðum, men vit eru sera takksom fyri, at øll fakfeløgini altíð hava víst legunum, serliga familjuleguni fyri brekað, so stóra virðing og vælvild, at legan ikki hevur verið hindrað, hvørki viðvíkjandi at fáa mat til vega ella at flyta ferðafólk við breki, hjálparfólk ella avvarðandi teirra við Strandfaraskipum Landsins. Tað eru vit fakfeløgunum sera takksom fyri. Tað var serliga Ellintur Abrahamsen, formaður í Føroya Skipara- & Navigatørfelag, sum slóðaði fyri hesum í fjør."

**Lega fyri einlig**

Frá 30. mai til 1. juni verður ein familjulega fyri einlig á Zarepta. Legan er serliga ætlað yngri einkjum og einkjumonnum og fráskildum við børnum ella uttan. Legan er eisini fyri tey, sum ongantíð fingu ein maka. Fólk úr ymiskum samkomum koma vanliga til hesa leguna, sum er sera gevandi fyri tey vaksnu og børnini. Halldóra Krett í Havn skipar fyri hesi leguni. Áhugað kunnu tekna seg áðrenn 24. mai á tlf. 317698 ella teldupost: h-krett@post.olivant.fo.

Almenna skráin hjá Zarepta byrjar Dýra biðidag við familjuleguni fyri brekað. Síðan verða familjulegur, summarlegur, bíbliuskeið, hjúnastevna, kvinnu- og mansstevnur. Seinasta legan í almennu skránni er heystlegan, ið er frá 10. - 15. oktober. Vetrarhálvárið eru eisini fleiri vikuskiftislegur, sum tær ymisku samkomurnar kring landið sjálvar skipa fyri.

### Ingun Gaardbo deildarleiðari á B6



1. mai varð Ingun Gaardbo sett sum deildarleiðar í B6 á Landssjúkrahúsinum. Ingun er fødd og uppvaksin á Toftum, dóttir Kirsten, f. Weihe, og Dánjal Petur Højgaard á Toftum. Hon varð útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur í 1988, og hevur hon arbeitt á B6 sum sjúkrarøktarfrøðingur síðan tá. Hon var í fleiri ár álitisumboð í felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarar. Ingun er gift við Eyðun Gaardbo úr Runavík, og eiga tey døturnar Kirstin og Barbaru. Familjan hevur búð í Runavík síðan 1988.

### Dagurin

**14. mai. Kristjan.** Teir vita einki um nakað halgimenni við hesum navni. Navnið er latínskt, gjørt eftir grikska navninum *Kristos*, sum aftur er týðing av tí hebráiska *Messiah*, ið merkir *salvaður*.

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg